*Klædningar og slips hjá teimum høgu harrunum máttu verjast av regnskjólum*







*Tveir av føroysku luttakarunum hava sett seg niður at kroka undir regnskjólunum*

*Regnskjólini, sum fyrireikararnir høvdu latið øllum luttakarunum, komu væl við leygarkvøldið*



*Føroyskir áskoðarar í góðum lag*



*Sekkjapíputónleikur setti dám ásetanina*




*Gunnar Dahl-Olsen bar føroyska flaggið til setanina, og Elspa Mørkøre bar vatnið úr Føroyum*



# Munur á tí størsta og minsta

24 oyggjar eru við til Oyggjaleikirnar í Hetlandi, men tað er stórur munur á, hvussu nógv ítróttarfólk oyggjarnar senda avstað. Vertirnir í Hetlandi hava meira fólk við enn vanligt við hesarð – 241 samanlagt – men tað er ikki hægsta talið, tí sambært almenna yvirlitinum hevur Guernsey ein luttakara meira. Føroyar hava umleið 120 luttakarar við. Tað er tó stórur munur á oynni við flest luttakarum og oynni við fægst luttakarum. Meðan Guernsey hevur 242 ítróttarfólk við, hevur Sark seks ítróttarfólk við, og tey taka øll lut í skjótingini. St. Helena hevur 15 ítróttarfólk við, Hitra 16 og Prince Edward Island 20.

**ek**

# Filskit er maskottur

Maskotturin til Oyggjaleikirnar í Hetlandi er ein hestur, sum eitur Filskit. Hann kann síggjast á skeltum kring oyggjarnar, har hann íðkar ymiskar ítróttargreinar. Maskotturin er teknaður av lokala listarmanninum Stevie Gordon ella »Smirk«, sum hann verður kallaður. Navnið á maskottinum sipar til, at hann er frískur – frisky – og í góðum lag.

**ek**

# Grønland 166.000 ferðir størri

Grønland er heimsins størsta oyggj, og tað er tí óneyðugt at siga, at Grønland eisini í Oyggjaleikasamanhangi er í flokki fyri seg. Allar hinar oyggjarnar tilsamans kunnu ikki bera seg saman við teir 1,2 milliónir ferkilometrarnar, sum Grønland er í areali. Og tá tað kemur til heimsins størst oyggj samanborið við minstu oynna í Oyggjaleikunum, so er Grønland 166.000 ferðir størri enn Gibraltar, sum bara er 7,2 ferkilometrar til støddar. Føroyar eru 1.399 ferkilometrar stórar. Guernsey, sum hevur flest luttakarar við og vann flest heiðursmerki seinast, er bara 24 ferkilometrar til støddar.

**ek**